Stu›ulsfólk

Søkt ver›ur eftir stu›ulsfólki til 20 ára gamlan mann, sum situr í koyristóli og b‡r í Tórshavn.

Arbei›i› hjá stu›linum er í samstarvi vi› mannin og Almannastovuna, at stu›la honum aftan á skúlatí›, m.a. at hjálpa honum vi› tí praktiska arbei›inum í sambandi vi› skúlaheimaarbei›i, fara vi› honum til frítí›arítriv m.a. svimjing og annars fara vi› honum til ymisk tiltøk.

Ney›ugt er, at tann, i› settur ver›ur, hevur koyrikort. Ynskiligt er, at stu›ulsfólki› er í aldrinum 20 til 28 ár.

Arbei›stí›in er 20 tímar um vikuna og arbeitt ver›ur seinnapartar/kvøld og okkurt vikuskifti. Setanin er fyribils 1 ár.

Lønar- og setanarvi›urskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálast‡ri› og Føroya Pedagogfelag.

Umsóknir mugu vera okkum í hendi skjótast gjørligt og í seinasta lagi 8. desember 2000. Umsóknir skulu vísa til j.nr. 1999-02/1384 og sendast til:

Almannastovuna
Stíla›: Minna Jacobsen
box 3096
110 Tórshavn

Nærri fæst at vita um starvi› vi› at venda sær til Minnu Jacobsen á tlf. 315480.

Til allar føroyskar damur

Kappingin
Miss Galaxy 2000

Sí›sta freist at tekna seg til Miss Galaxy 2000 er 10. des. Vinnarin sleppur ví›ari til VM í Spania og HM í Kina, har alt er goldi›.

Áhuga›i kunnu venda sær til Jákup tlf. 22 51 62

INT Promotion

Almennur fyrilestur

vi› Christopher Gillberg, professara í barnapsykiatri, ver›ur í Læraraskúlahøllini mánadagin 27. november 2000, kl. 20.00.

Evni: Børn vi› sálarligum trupulleikum.
Autisma – Asberger – Damp o.a.

Psykiatriska deild
Sernámsdepilin
og
Føroya Læraraskúli

Fulltrúi í Løgtinginum

Í Løgtinginum er eitt starv sum fulltrúi leyst at søkja.

Arbei›suppgávurnar hjá fulltrúanum ver›a hesar:

- Tann, sum settur ver›ur, ver›ur skrivari hjá føroysku sendinevndunum í Nor›urlandará›num og Útnor›urrá›num.
- Taka sær av ø›rum altjó›a uppgávum á skrivstovuni.
- At luttaka í vanligari málsvi›ger› á skrivstovuni.

Gjørt ver›ur vart vi›, at roknast má vi› rættiliga nógvari fer›ing uttanlands í sambandi vi› arbei›i› í nor›urlendsku sendinevndunum.

Uppgávurnar hjá umsiting tingsins eru:
at taka sær av øllum umsitingarligum uppgávum Løgtingsins
at vera rá›gevi hjá Løgtingi og løgtingsnevndum í øllum løgfrø›iligum spurningum, herundir at ansa eftir, at øll mál eru løgfrø›iliga og málsliga røtt
at røkja skrivarauppgávur í Løgtinginum og løgtingsnevndum
at taka sær av skrivarauppgávum hjá Løgtingsins sendinevndum í Nor›urlandará›num og Útnor›urrá›num.

Á skrivstovuni arbei›a í løtuni 8 fólk, harav 3 løgfrø›ingarar.

Ynskiligt er, at tann, sum settur ver›ur, hevur loki› embætisprógv í samfelagsvísindi, men fólk vi› a›rari útbugving kunnu eisini søkja. Tann, i› settur ver›ur, skal hava áhuga fyri politiskum og samfelagsligum vi›urskiftum.

Løn sambært sáttmála millum landsst‡ri› og BLF ella avvar›andi yrkisfelag.

Tann, sum settur ver›ur, má tola broytingar í arbei›suppgávunum.

Nærri uppl‡singar um starvi› fáast vi› at venda sær til umsiting Løgtingsins, telefon 311000, att. Súsonnu Danielsen, stjóra, ella Kristinu Samuelsen, fulltrúa.

Tøkk!

Valevni og feløg takka hjartaliga øllum, sum stu›la›u flokkinum á b‡rá›svalinum í Tórshavnar kommunu.

Tøkk skulu tit hava, i› valdu okkum, og tøkk skulu tit hava, i› arbeiddu fyri listan og hjálptu okkum at røkka einum gó›um úrsliti.

B‡rá›sumbo›ini fara at gera sítt ítarsta fyri at liva upp til áliti›.

Einafer› enn: Tøkk.

Su›urstreymoyar Javna›arfelag
og
valevnini

Almanna- og heilsuútbúgvingin í Su›uroy

Lærari

Í sambandi vi› at tær n‡ggju almanna- og heilsuútbúgvingarnar skulu byrja komandi ár er eitt starv sum lærari á Almanna- og heilsuútbúgvingini á Tvøroyri leyst til setan 1. januar 2001 ella eftir avtalu.

Uppgávan hjá læraranum ver›ur:

- saman vi› deildarlei›aranum at gera útvbúgvingar- og undirvísingarætlanir fyri útbúgvingarnar
  og skipa fyri undirvísingini
- undirvísa á útbúgvingunum

Ynskiligt er at umsøkjarin

- er førur fyri at undirvísa í heilsu- og røktarfakum
- hevur eina mi›allanga framhaldsútbúgving sum til dømis sjúkrasystir, fyrsioterapeutur, ergoterapeutur
  ella líknandi
- hevur ví›ariútbúgving innan pedagogik t.d. á diplomstø›i
- starvsroyndir innan almanna-/heilsuøki ›
- hevur gó› samstarvsevni

Talan er um eitt spennandi starv, har møguleiki er fyri n‡hugsan og n‡skapan, nú útbúgvingarnar skulu leggjast tilrættis heilt av n‡ggjum.

Sáttmála- og setanartreytir ver›a sambært sáttmála millum Fíggjarmálast‡ri› og avvar›andi yrkisfelag.

Umsókn saman vi› CV og útbúgvingarskjølum ver›ur at senda til

Sjúkrasystraskúla Føroya
Rektaran
Eirargar›ur 14
100 Tórshavn

í seinasta lagi 27. november 2000

Meiri fæst at vita um starvi› vi› at venda sær til Bergliot Ihlen, rektara tlf. 316027 loakl 436

Frá 1000 ára haldinum

Sunnudagin 26. november kl. 15.30 heldur Nicolina Jensen Beder fyrilestur í Sólarmagn á Velbasta›. Evni›: Halgan stundar til.

FØROYAR KRISTNAR
Í 1000 ÁR
Postboks 1121 · tlf. +298 321132
+298 321761 · FO-110 Tórshavn

Lýsið í **sosialinum**

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

Pedagogar

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir pedagogum til barnagarðsstovur og vøggustovu í Býlingshúsinum á Norðasta Horni.

Barnagarðsstova við 21 børnum.
Pedagogstarv 40 tímar um vikuna. Verður at set 1. januar 2001 ella eftir nærri avtalu.

Barnagarðsstova við 18 børnum.
Pedagogstarv 40 tímar um vikuna. Verður sett 1. januar 2001 ella eftir nærri avtalu.

Vøggustova við 11 børnum.
Pedagogstarv 35 tímar um vikuna. Møguleiki er eisini fyri 40 tímum um vikuna. Verður sett 1. mars 2001.

Vit bjóða
eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum.

Dentur verður lagdur á, at tær dámar at vera uttandura í øllum veðri, megnar at skapa ein tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum.

Setanarviðurskifti
Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri. Um pedagogur ikki søkir, verður hjálparfólk sett í avmarkað tíð.

Meira fæst at vita
við at venda sær til Óla Midjord, leiðara, tlf. 31 09 05, ella Katrin Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

Umsóknir
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Býlingshúsinum á Norðasta Horni, Granagøta 5, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 15. desember 2000.

S N A R S K I V A N

VIKARUR

Søkt ver›ur eftir sáttmálasettum lærara – 14 tímar um vikuna í 9. og 10. flokki – tí›arskei›i› 01.01.2001 til 30.06.2001 fyri lærara í farloyvi.

Starvi›, sum er tí›aravmarka›, ver›ur lønt sbr. avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálast‡ri› í lønarflokkunum 13.4 til 26.4.

Umsóknir skulu vera Felagsskúlanum í hendi í seinasta lagi 10. desember 2000.

Nærri uppl‡singar fáast frá skúlalei›aranum – tlf. 422084 ella 423098 (heima).

Felagsskúlin á Oyrarbakka
450 Oyrarbakki

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

Skrivstovufólk

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir skrivstovufólki til Hoyvíkar skúla at arbeiða hálva tíð.

Arbeiðið umfatar
vanligt skrivstovuarbeiði og roknskaparførslu.

Førleikakrøv
Umsøkjarin skal hava skrivstovuútbúgving, duga at arbeiða sjálvstøðugt og virka í góðum samstarvi við starvsfelagar.

Setanarviðurskifti
Starvið verður sett 1. januar 2001. Løn sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

Meira fæst at vita
um starvið við at venda sær til Petur Dahl, skúlastjóra, tlf. 31 50 73 ella Jákup Simonsen, deildarleiðara, tlf. 31 51 60.

Umsóknir
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 12. desember 2000. Viðmerk á umsóknina "Skrivstovufólk".

S N A R S K I V A N

Barnagar›urin á Velbasta›

Søkt ver›ur eftir

2 pedagogum

at byrja 1. januar 2001.

Arbei›stí›: 40 tímar um vikuna (ella evt. 30 tímar).

Lønar- og setanarvi›urskifti sambært sáttmála millum Føroya Landsst‡ri og Føroya Pedagogfelag; lønarflokki 11/13 (16-22).

Í Barnagar›inum á Velbasta› eru 40 børn í trimum aldursb‡ttum stovnum (0-1 ár, 2-4 ár og 4-8 ár). Opi› er frá kl. 7.30 til 17.30.

Skrivligar umsóknir vi› avriti av prógvi og møguligum vi›mælum skulu vera barnagar›inum í hendi í seinasta lagi 11. desember 2000.

Um pedagogar ikki ver›a settir í størvini, ver›a hjálparfólk sett fyribils.

Nærri uppl‡singar fáast vi› at venda sær til barnagar›in.

Barnagar›urin á Velbasta›
176 Velbasta›
Tlf. 318121 · Fax 328077
Teldupostur: velbarn@post.olivant.fo

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

Málsviðgeri

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir málsviðgera til mentamáladeildina.

Mentamáladeildin
er deild undir trivnaðarfyrisitingini og hevur umsitingina av tí partinum av føroysku skúlalóggávuni, ið við lógum um fólkaskúla, frítíðarundirvísing o.a. og øðrum skúlalógum er løgd út á kommununa og Tórshavnar skúlaráð.

Deildin hevur um hendi menta- og skúlamál sum heild, ítróttamál og studningar. Mentamáladeildin leggur til rættis og avgreiðir øll mál, sum verða løgd fyri í mentamálanevndini og skúlaráðum.

Harumframt skipar deildin fyri hátíðarhald av ymiskum slag, m.a. tá ið árligu heiðurslønirnar verða latnar.

Nakrar av høvuðsuppgávunum eru:

- málsviðgerð
- fundarfrásagnir
- skipa fyri og hava fundir um menta- og skúlamál
- samskifta við fólkaskúlarnar, musikkskúlan, kvøldskúlan, býarbókasavnið, kunningarstovuna, svimjihøllina, stadionøkið, ítróttarfeløgini og onnur feløg og einstaklingar, sum arbeiða við mentamálum
- projsektarbeiði í sambandi við mentanarálitið
- arbeiði í sambandi við nýggju fólkaskúlalógini

Førleikakrøv
Umsøkjarin skal hava viðkomandi útbúgvin og skal hava teldukunnleika. Skal duga føroykst, danskt og enskt til lítar.

Persónligar eginleikar
Umráðandi er, at viðkomandi er áhugaður í mentunarøkinum, dugir væl at leggja til rættis, er fyrikomandi, kann arbeiða sjálvstøðugt og dugir væl at samskifta, bæðið innan- og uttanhýsis.

Setanarviðurskifti
Starvið verður sett skjótast tilber. Løn sambært sáttmálanum við avarðandi yrkisfelag.

Kommunan bjóðar
eitt áhugavert starv við nógvum fjølbroyttum og mennandi uppgávum, har tú hevur møguleika fyri fakligari og persónligari menning.

Meira fæst at vita
um starvið við at venda sær til Jákup Simonsen, deildarleiðara, ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, tlf. 31 51 60.

Umsóknir
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 18. desember 2000. Viðmerk á umsóknina "Málsviðgeri".

S N A R S K I V A N